

*Johan Norðfoss starvaðist sum lívbjargari í gamla svimjihyli í Gundadali - og í nýggju svimjihøllini í tilsamans 27 ár*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

hvussu langt hann svam.

Dagligi setningurin var 500 metur, og hvørja ferð, hann hevði svomið hesa longdina, setti hann ein kross í álmanakkan. Uppgerðin fyri árini aftaná vísir, at Johan hevur svomið hesar teinar síðan 2001:

85 km
82 -
95 -
83 -
85 -
92 -
50 - til dagin vit tosaðu saman.

Hetta gevur tilsaman 556 km ella góðar 300 fjórðingar. Hann svimur fýra dagar um vikuna í 11 mánaðir. Svimjihylur er afurlatin ein mánað á jólun, so tá er einki.

Aldurin er farin at merkjast eitt lítið sindur. Hetta sæst av, at fyrr brúkti Johan 25 minuttir um 500 metur. Nú brúkar hann 30 minuttir.

Tá ið Johan var upp á sítt besta nýtti hann 12-14 tøk fyri at svimja longdina á hylinum, 25 metur. Nú má hann nýta 22 tøk! Umframt svimjingina er hann eisini ein tíma í hitarúminum. Tað er alment kent, at her frættist alt, sum hendir í samfelagnum, og hesi viðurskifti verða eisini viðgjørd út í æsir.

Annars má tað sigast at vera gott fyri heilsuna at svimja. Teir eru nakrir gamlir knarkar, sum hittast har uppi. Tann elsti er 90 ára gamli Sámal Patursson í Kirkjubø.

Vanliga svimja menninir seinnapart, meðan konufólkið, morgunfrúurnar, svimja um morgunin. Tær eru eisini upp til 90 ára gamlar!

## Nú er eftir at svimja heim aftur úr Íslandi

Nú Johan er komin til Íslands er næsta stigið at koma heim aftur. Tað skuldu vónir verið fyri tí, tí Johan hevur gott til at bregða, tá ið tað ræður um at eldast. Hornamenninir er kendur fyri at eldast væl. Abbin Dánjal í Horni gjørdist 95 ár, og tað sama hevur verið við pápabeiggjunum, sum teir flestu komu upp í 90-ini. Hetta er ikki minni galdandi í móðurættini. Mosturin Jacobina í Pállshúsi á Eiði gjørdist 102 ára gomul, og hinar systrarnar hjá henni blivu fleiri og 90 ára gamlar.

Heilsan hjá Johan er góð enn. Tó er farið at bila við eygunum.

## Fekk seg royndan sum lívbjargari

Fyri at kunna arbeiða í einum svimjihyli er tað sjálvsagt neyðugt, at duga at svimja. Men tað er eisini neyðugt at kunna trakka til, um nakað hendir. Tí er eisini neyðugt við lívbjargaraprógv. Hetta hevur Johan eisini. Hann tók fyrsta prógvið í 1982, og í 1984 tók hann eitt víðkað lívbjargaprógv við munandi hægri krøvum millum annað við upplívan av fólki.

Tíbetur er svimjihylurin í Havn sloppin væl frá álvarligum óhappum, takkað veri tí væl útbúna starvsfólkinum. Men eina serliga ferð fekk Johan kortini brúk fyri allari sína vitan á økinum, og tað var í Nólsoyarfirði.

Tað var ein bátur sum sendi út neyðarkall. Bátar fóru at leita og komu fram á ein mann, sum hekk í eini boyu, og sum var illa fyri. Hann var tikin umborð í ein bát, sum royndi at hjálpa upp á mannin, samstundis sum kós varð sett móti Havnini. Eisini var kallað eftir fólki, sum dugdi fyrstuhjálp.

Johan var saman við øðrum á floti hendan dagin og luttók eisini í leitingini. Teir fingu so hendan mannin umborð til teirra. Teir fóru beinanvegin undir at royna at fáa lív í mannin eftir øllum fyriskriftum, eins og maðurin fekk hjartamassagu, meðan teir við fullari ferð sigldu móti Havnini, og varð maðurin beinanvegin fluttur á landssjúkrahúsið. Maðurin doyði nakað seinni, men Johan og hansara felagar gjørdu í hvussu er tað, sum kundi og skuldi gerast.

Johan hevur dámt væl at vera á floti, og hetta hevur hann gjørt nógv av. Men nú hava teir yngru tikið yvir. Eisini hevur hann havt kríatúr á trøðni, eisini gæs. Tískil hevur tað ongantíð verið nakar spurningur, hvat borðreiðast skuldi við á jólum.



*Johan og konan Emmy*

Her kann verða skoytt uppí, at Johan altíð hevur roynt at gera seg dugnaligari. Sum 53 ára gamal tók hann prógvið "Teknisk Forberedelseseksamen". Karakterirnir vóru upp til 11!

Sum sagt veit Johan nógv at greiða frá, og ætlanin er at fáa eitt prát við hann seinni um hansara hendingaríka lív. Men fyribils takka vit fyri hesa áhugaverdu frásøgnina.

Sosialurin